Álit

í

løgtingsmáli nr. 78/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at byggja eitt búheim og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu (Øktar útreiðslur til verkætlanina)

Landsstýrismaðurin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, hevur lagt málið fram 27. januar 2021 og eftir 1. viðgerð 17. februar 2021, er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 8., 9., 11. og 18. mars 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Autismufelagið, landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, og landsstýrismannin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, saman við Almannaverkinum og Landsverki.

Ein samd nevnd vísir á, at galdandi lóggáva, løgtingslóg nr. 60 frá 30. apríl 2018 heimilar at fara undir at byggja eitt búheim og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu fyri 29 mió. kr.

Byggingin fevnir um tríggjar eindir; eina búfólkaeind við seks búplássum, eina umlættingareind við seks umlættingarplássum og eitt dagtilboð til á leið 16 borgarar. Í viðmerkingunum til lógina stendur, at kostnaðarmetingin er gjørd út frá eini byggiskrá, og við ávísum fyrivarni er kostnaðarmetingin 29 mió. kr.

Liðin eru nú knapt trý ár síðani, at galdandi lóggáva, løgtingslóg nr. 60 frá 30 apríl 2018, heimilaði at farast skuldi undir at byggja eitt búheim og umlættingarheim til børn og ung við autismu. Vit fegnast tí um, at vit nú endiliga eru komin hartil, at farast kann at byggja hetta heim, sum so nógv brúk er fyri, og sum vit hava bíðað eftir í so langa tíð.

Verkætlanin hevur verið í útboði fyri góðum ári síðani, men innkomnu tilboðini vóru munandi hægri enn kostnaðarmetingin, og lægsta tilboðið, saman við øðrum útreiðslum, var oman fyri 56 mió. kr.

Landsstýrismaðurin tók tí avgerð um at havna lisitatiónini. Seinasta árið er farið við at finna sparingar og gera nýtt høvuðsprosjekt. Fleiri sparingar eru gjørdar, tó uttan at tað gongur út yvir funktiónirnar og virksemið í heiminum. Hesum hevur nevndin eisini fingið váttan fyri, nú málið hevur verið til viðgerðar í nevndini.

Hetta lógaruppskotið varð lagt fyri Løgtingið, nú búheimið, umlættingarheimið og virknis-tænastan til børn og ung við autismu er liðugt prosjekterað, arbeiðstøkurnar hava verið í útboði og kostnaðurin er kendur. Samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina er nú 39 mió. kr, og tí verður karmurin við hesum lógaruppskoti hækkaður við 10 mió. kr., soleiðis at fíggjarliga heimildin í verklagslógini verður 39 mió. kr.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 23. mars 2021

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Jákup Mikkelsen
Bill Justinussen	Kristin Michelsen	Páll á Reynatúgvu
	Ruth Vang	